# Ikki eitt komma samtykt í kabinettmáli

BJØRN KALSØ
løgtingsmaður
Sambandsflokkurin



Tá uppskotið um fiskidagar var til viðgerðar á Løgtingi, søgdu løgmaður, landstýrismaðurin í uttanríkismálum og landsstýrismaðurin í fiski- og tilfeingismálum, at talan var um kabinettmál, tí fiskivinnupolitikkurin var legitimiteturin hjá CHE-samgonguni. Ikki eitt komma varð samtykt í uppskotinum. Sambandsflokkurin bjargaði á mállinjuni. "Samgongan" sær korini út til at halda fram uttan legitimitet og uttan mið og mál.

**Uppskot um fiskidagar**
Landsstýrismaðurin í fiski- og tilfeingismálum legði á ólavsøku uppskot um fiskidagar fyri Løgtingið. Einki høpi var í uppskotinum, sum legði upp til at syndra okkara høvuðsvinnu. Landsstýrismaðurin skeyt upp at skerja fiskidagarnar hjá línu- og smærru trolbátunum við 50 prosentum og partrolarum við 20 prosentum. Skotið var eisini upp at friða økir. Eittnú Føroya Banka, við lóg, hóast landsstýrismaðurin frammanundan hevði fulla heimild at friða uttan lógarbroyting.

**Kabinettmál**
Tá uppskotið var til viðgerðar í Løgtinginum søgdu løgmaður, landsstýrismaðurin í uttanríkismálum og landsstýrismaðurin í fiski- og tilfeingismálum, at talan var um kabinettmál. Allir søgdu teir, at samgongan var fokin um uppskotið ikki varð samtykt, tí sum løgmaður fleiri ferðir hevur tikið til: "Fiskivinnupolitikkurin er legitimiteturin hjá CHE-samgonguni". Soleiðis ætlaðu teir tríggir odvitanir at tvinga ávísar samgongulimir at atkvøða fyri uppskotinum ímóti viti og skili og ímóti teirra sannføring.

**Sambandsflokkurin bjargaði á mállinjuni**
Tíbetur fekk Sambandsflokkurin málið á rættkjøl á mállinjuni undir viðgerðini á Løgtingi. Ikki eitt komma í uppskotinum frá landsstýrismanninum, ella neyðsemjuni á 20 prosent niðurskurð yvir ein kamb, sum varð gjørd í samgonguni undir viðgerðini, varð samtykt. Sambandsflokkurin fekk alla andstøðuna og skilafólk í samgonguni, sum ikki lat seg stýra av hóttanum um samgonguslit, at taka undir við neyðugum tillagingum og einum niðurskurði á 10 prosent.

**Tvíhalda um maktina kortini**
Tað undrunarverda er tó, at hóast samgongan nú sambært løgmanni og tveimum ráðharrum ongan legitimitet hevur, hóast ikki eitt komma var samtykt í kabinettmáli og hóast eigin meiriluti tykist vera fyri politikkinum hjá samgonguni á Løgtingi, ja so tvíhalda løgmaður, landsstýrismaðurin í uttanríkismálum, og landsstýrismaðurin í fiski- og tilfeingismálum framvegis um maktina í landsstýrinum.
Somuleiðis sær út til, at samgongan ætlar at halda fram við at sindra okkara vinnulív og knokkroyta fólki í landinum. Uppskotið um landsjørð hjá løgmanni, Tobba og Birni á Heygum, sum kom sum lundi á jólanátt herfyri, skatta- og avgjaldshækkingar og ein komandi CHE-fíggjarlóg við stórum halli, fara at prógva at so er.

# Útvarpið flytir fokus

HELGI ABRAHAMSEN



Týsdagin 9. september var tingfundur, har fyrsta mál á skránni var atkvøðugreiðsla um at velja tingnevndirnar av nýggjum. Hetta var ein beinleiðis avleiðing av samstarvsavtaluni, sum samgongufloksarnir hava gjørt við Sjálvstýrisflokkin. Men av tí at samgongustevið er sum tað er, var áðrenn tingfundin, ivasamt um meiriluti fór at vera fyri uppskotinum. Hevði uppskotið fallið, hevði grundarlagið undir samstarvsavtaluni við Sjálvstýrisflokkin helst verið burtur.
Henda støða gjørdi, at tað fyri allar partar var umráðandi, at eingin atkvøða manglaði í tinginum henda dagin. Tí gjørdi Edmund Joensen av at kalla varamann inn fyri seg, nú hann var burturstaddur í fólkatingsørindum.

**Samgongan ikki fullmannað**
Tá tingfundurin byrjaði, vóru andstøðuflokkarnir fullmannaðir (um vit rokna Sjálvstýrisflokkin uppí samgonguna), men hjá samgonguni manglaðu tríggir tinglimir, sum ikki høvdu kalla varamenn inn fyri seg. Sostatt bendir alt á, at málið hevði fallið, um tað kom til atkvøðugreiðslu. Men atkvøðugreiðsla bleiv eingin, tí málið bleiv útsett.
Eingin tingfundur hevur verið síðani 22. august, og næsti tingfundur verður ikki aftur fyrr enn 16. september. Tí er tað løgið, at mál mugu takast av skránni, tí at fólk ikki fáa møtt til henda eina tingfundin. Men tað løgnasta av øllum er, at ístaðin fyri at seta kikaran á hetta, so verður nú alt fokusið sett á lønina hjá Edmundi Joensen, tí hann hevði sett ein varamann í sessin henda dagin.
Hevði Edmund vita, at málið bleiv tikið av skrá, so kundi hann bara gjørt sum teir tríggir samgongulimirnir og latið sín sess standa tóman. So kundi tingarbeiðið koyrt víðari – ella rættari sagt: slett ikki koyrt, og eingin hevði sagt nakað.

**Skipanin**
Skipanin við farloyvum í løgtinginum er soleiðis samansett, at ein tingmaður sum letur varamann koma á ting fyri seg, meðan hann er burturstaddur í privatum ørindum, missir sína løn til varamannin. Men fer ein tingmaður til dømis á ST-aðalfund, og letur varamann koma á ting fyri seg meðan hann er burturstaddur í politiskum ørindum, so fáa báðir løn. Tað er sjálvsagt eisini rímiligt, at tingmenn ikki missa lønina, um fráveran er partur av teirra politiska arbeiði.
Av eini ella aðrari orsøk er fólkatingsarbeiðið komið undir hesa skipanina við politiskum ørindum, hóast talan tá er um eitt lønt politiskt arbeiði. Hetta er ein skipan, sum ikki er íkomin nýliga, men hevur verið brúkt í nógv ár. Um skipanin eigur at verða broytt, kunnu vit sjálvsagt hava okkara meining um, men so leingi sum hon er galdandi, er hon galdandi.

**Flyta fokus**
Onkuntíð kann ein undrast yvir samanfallið í tíðindunum, sum verða borin her á landi. Tað undrar meg ikki so lítið, at Útvarpið fer at tosa um lønina hjá Edmundi Joensen akkurát tá vaktarskifti er í hinum føroyska fólkatingssessinum. Tann sum fer úr tí sessinum, hevur ikki sitið í løgtinginum, meðan hann hevur verið á fólkatingi, men tann sum kemur í sessin, ætlar at røkja báðar sessirnar samstundis.
– Er hetta eitt tilvildarligt samanfall, ella er endamálið at flyta fokus?

# Leggja kommunurnar í Hvannasundi og Klaksvík saman?

BJARNI DEBESS

Dagliga hoyra vit orðini, kommunusamanlegging og at kommunur leggja saman. Hetta er grov reingjan av veruleikanum og ber brá av tølan og bóndafangarí. Her eru onnur røtt orð, sum siga frá veruligu ætlanini ið er: At avtaka, niðurleggja, - á donskum, at ophøre og afskaffe- eina kommunu, í hesum føri Hvannasunds kommunu.
Ein kommuna hevur eitt kommunustýri, tí eru tað ikki tvær kommunur, sum leggja saman. Fólk liggja saman, men at leggja fólk saman ljóðar løgið. Tað sum ætlanin er við samanleggingini, er (kanska mest hjá Klaksvíkar kommunu) at niðurleggja/ avtaka Hvannasunds kommunu. Tá tað er gjørt, hava øll tey í bygdum og bygdarløgum við sundið mist allan suverinitet og sjálvsavgerðarrætt. Vit hesum er Hvannasunds kommuna, stutt sagt, strikað av landkortinum. Hon er ikki til meira, og sambært lóg vendist ikki aftur. Spyrjast kann so: Hví halda eina fólkaatkvøðu, tá tey frammanundan vita, at hon ikki verður respekterað..? Hóast hetta, segði bygdaráðsformaðurin í Fuglafirði, at halda vit fólkaatkvøðu, so skal hon respekterast. "Hattin av fyri honum".
Tá sokallaða samanleggingin er gjørd, hevur fólkið við sundið einki at siga. Alt vald er tá suverent lagt undir Klaksvíkar kommunu. Alt innan og uttangarðs, strendurnar, byggiloyvir og bygdarløgini annars o.s.fr. Kommunan er aldargomul, - ein arvur frá farnum ættarliðum, - eitt amboð eins og fakfeløg til stýringar og avgerðir í nærumhvørvinum. Í støðd eru kommunurnar sera ymiskar og tað er júst hesin støddarmunur, sum ger føroysku kommunurnar so óegnaðar til avtøku og samanleggingar. Hví ikki heldur samarbeiði? Stóra kommunan kann jú fáa tilboð um at koma inn, men ikki fyri einhvønn prís.
Tvey dømi úr Havn, sum eg haldi vísa at stóra kommunan lættliga kann vísa hóvuðkambalindi og eirindaleysa framferð. Fyrst um bygdarlagið Sund. Miðskeiðis á syðra armi við Kaldbaksfjørð, - fyrst kai og havnarlag frammanfyri vindeyguni við alskyns óruddi, so eitt stórt elverk við norðaru síðu, til seinast eitt asfaltverk á suðursíðu, bert eitt byrsumál – 40 m – frá sethúsum. Har er roykur frá skorsteinum, asfalti og lastvognarnir við asfalti koyra um húsarhorn. At fólk kunnu liva í hesum "kommunulorti" og tí sera vandamikla royki frá skorsteinum og asfalti er ein gáta.
Annað dømi er um Kollafjørð, har Havnar kommuna hevur sprongt og forvandlað Innifjørð á suðursíðu, fyrst eitt havnarlag til Norrønu og samstundis eina kontainarahavn. Í øðrum londum byggja teir slík anlegg uttanfyri bygd øki. Misnøgdin hjá fólkinum og tann langa røð av lesarabrøvum við bøn um at sleppa undan hesi vandalisering er til fánýtis.
Nevnast skal eisini at Innifjørður í skiftandi árstíðum er sermerktur og telist millum vakrastu pláss í Føroyum.
Havnar kommuna "tann stóra" er bert eitt dømi um, hvat tær smærru kommunurnar kunnu síggja fram til í tí sokallaðu samanleggingini.

# Gerið gráu útfyllingina við Sandin til grønt øki

ELSEBETH GUNNLEYGSDÓTTUR HANSEN



Í Klaksvík er gott at vera, og nógvastaðni er sera vakurt, og nógv er hent í miðbýnum hesi seinastu árini til gleði fyri øll. Tað, sum tó dominerar og pínir hjá nógvum klaksvíkskingum er sum øllum kunnugt, Sandurin, sum bleiv til eina gráa útfylling. Eri sjálvandi vælvitandi um, at byggjast skal á útfyllingina við Sandin í samband við miðbýarætlanina, sum verður eitt prýði fyri býin, tá ið hon er liðug… men nær kemur miðbýurin, sum vit hava bíðað so leingi eftir, og hvat gera vit ímeðan vit bíða?
Eitt hugskot er, at meðan vit bíða eftir miðbýnum gera gráu útfyllingina við Sandin til grønt øki. Tað burdi ikki verið ringt at lagt flag á økið nú tað er planerað. Flagið kann lættliga takast av aftur so hvørt sum tað verður bygt á økið.
Á grøna økinum kundu verið borð og stólar, har fólk hava møguleika at sita og hugna sær við tí fantastiska útsýninum. Møguleiki er eisini at gera ymiskt til børnini, soleiðis, at tey eisini kunnu hugna sær við ymiskum spæli. Bara hugflogið setir mørkini. Vónandi verður býráðið opið fyri slíkum.
Týdningarmikið er, at eingin bilferðsla verður á økinum.

**Fjøruvegur**
Fjøran á vestursíðani kundi verið ruddað, reinsað og nýggjur sandur verði lagdur framvið fjørðuni. Síðani kundi ein gongubreyt verið gjørd framvið fjørðuni í hugnaliga umhvørvinum. Sjálvandi er eisini neyðugt at hugsa um hvalvágina í hesum høpi.
Hetta hevur verið tosað um fyrr, men onki er gjørt við hetta. Hví ikki gera hetta til veruleika?

**Hugnakrók**
Havi luftað tankan fyrr og geri tað aftur, at plássið beint heimanfyri Blikksmiðjuna ikki verður brúkt til parkeringspláss, men heldur verður gjørt til eitt hugnaligt umhvørvi, har fólk kunnu seta seg niður og njóta tað góða útsýnið.
Eg eri ikki fyri fyribilsloysnum, men nú eru vit komin hartil, at neyðugt er at gera býin so hugnaligan og fjálgan sum tilber, meðan vit bíða eftir at okkurt hendir á gráu útfyllingini.